NORÐOYA SPARIKASSI
HØVUÐSSTUÐUL

# Venjingartíðir hjá Støkk 2008-2009

| Lið | Dagur | Venjingartíð | Stað | Venjari |
|---|---|---|---|---|
| **Børn undir skúlaaldur** | | | | |
| Foreldur og barn | Týsdag | 17:30-18:30 | Rituvíkar skúli | Anni og Jóhanna |
| Gentur 4 ár | Mikudag | 18:00-19:30 | Rituvíkar skúli | Sigbjørg og Jonna |
| Gentur 5 ár | Mikudag | 17:30-18:30 | Søldarfjarðar skúli | Jastrid og Dagbjørt |
| Gentur 6 ár | Mikudag | 16:30-17:30 | Søldarfjarðar skúli | Marjun og Katrin A. |
| Dreingir 4-5 ár | Mánadag | 16:30-17:30 | Rituvíkar skúli | Lis og Erla |
| Dreingir 6 ár | Hósdag | 16:30-17:30 | Rituvíkar skúli | Jóhannus og Atle |
| **Børn í skúlaaldri** | | | | |
| 1. flokkur dreingir | Fríggjadag | 16:30-18:00 | Glyvra Skúli | Joan |
| 2. flokkur dreingir | Týsdag | 17.00-18:00 | Glyvra Skúli | Rannvá og Turið |
| 3.-4. flokkur dreingir | Mikudag | 16:30-18:00 | Glyvra Skúli | Sofus, Hallbjørg og Eivi |
| 5.-6.-7. flokkur dreingir | Fríggjadag | 20:30-22:00 | Støkkhøllin | Jan Martin og Jónleif |
| 1. flokkur gentur | Mikudag | 16:30-17:30 | Rituvíkar skúli | Magnhild og Karin Elisa |
| 2. flokkur gentur | Mándag | 18:00-19:30 | Glyvra Skúli | Sólbjørg og Amy |
| 3. flokkur gentur | Hósdag | 18:00-19:30 | Glyvra Skúli | Lív og Vár |
| 4. flokkur gentur | Mikudag | 18:00-19:30 | Glyvra Skúli | Ninni og Poulina |
| 5. flokkur gentur | Fríggjadag | 18:00-19:30 | Glyvra Skúli | Kirstin og Rutt |
| 6. flokkur gentur | Týsdag | 18:00-19:30 | Glyvra Skúli | Anna og Masa |
| 7. flokkur gentur | Mándag | 20:00-21:30 | Søldarfjarðar Skúli | Gunnvá og Katrin T. |
| 8. flokkur gentur | Týsdag | 21:00-22:30 | Glyvra Skúli | Sanna og Sigrun |
| 9.-10. flokkur gentur | Hósdag | 21:00-22:30 | Glyvra Skúli | Katrin F. og Diana |
| **Onnur lið** | | | | |
| Kvinnur | Mikudag | 19:30-21:00 | Glyvra Skúli | Lis |
| Ungar Kvinnur (showdance) | Mándag | 19:00-20:00 | Rituvíkar Skúli | Sigrið |
| Løtt motión | Týsdag | 19:30-21:00 | Glyvra Skúli | Jóhanna T og Jóhanna P. |
| Reiðskap og styrki | Hósdag | 20:00-21:30 | Støkkhøllin | Sámal Jákup |
| **Kappingarlið í estetiskum fimleiki** | | | | |
| Grundvenjing 6 ár + 1. fl. | Fríggjadag | 17:00-18:30 | Søldarfjørður | Guðrun |
| Pinkur A | Týsdag | 16:00-17:30 | Søldarfjørður | Eyð og Helena |
| | Mikudag | 18:30-20:00 | Søldarfjørður | |
| | Fríggjadag | 15:00-16:30 | Ítróttarhøllin í Runavík | |
| Pinkur B | Týsdag | 16:00-17:30 | Søldarfjørður | Ragnfríð, Kára og Hansa |
| | Hósdag | 17:00-18:30 | Søldarfjørður | |
| | Fríggjadag | 15:00-16:30 | Ítróttarhøllin í Runavík | |
| Smágentur | Mánadag | 18:00-20:00 | Søldarfjørður | Dagbjørt og Hansa |
| | Týsdag | 17:30-19:00 | Søldarfjørður | |
| | Fríggjadag | 16:30-18:00 | Ítróttarhøllin í Runavík | |
| Gentur | Mánadag | 16:30-18:30 | Søldarfjørður | Rannvá, Bjørt og Mia |
| | Týsdag | 19:00-21:00 | Søldarfjørður | |
| | Fríggjadag | 15:00-16:30 | Ítróttarhøllin í Runavík | |
| Kvinnuunglingar | Mánadag | 16:30-18:00 | Glyvra Skúli | Bodil og Ann Mari |
| | Hósdag | 18:30-20:30 | Søldarfjørður | |
| | Fríggjadag | 16:30-18:00 | Ítróttarhøllin í Runavík | |
| **Kappingarlið í reiðskapi** | | | | |
| 1.-4. flokkur gentur | Mánadag | 15.30-17:30 | Støkkhøllin | Silja, Kristina, |
| | Hósdag | 16:00-18:00 | Støkkhøllin | Fríðhild og Sonja |
| Gentur | Mánadag | 19:30-21:30 | Støkkhøllin | Súsanna |
| | Mikudag | 17:30-19:30 | Støkkhøllin | |
| | Leygardag | 10:00-12:00 | Støkkhøllin | |
| Kvinnuunglingar | Týsdag | 16:30-18:30 | Støkkhøllin | Anita og Monika |
| | Fríggjadag | 16:30-18:30 | Støkkhøllin | |
| | Leygardag | 12:00-14:00 | Støkkhøllin | |
| Kvinnur | Mánadag | 17:30-19:30 | Støkkhøllin | Durita |
| | Hósdag | 18:00-20:00 | Støkkhøllin | |
| | Leygardag | 14:00-16:00 | Støkkhøllin | |
| Úrvalslið dreingir | Hósdag | 19:30-21:00 | Glyvra Skúli | Ludvík og Kristian |
| Dreingir | Týsdag | 18:30-20:30 | Støkkhøllin | Ludvík og Kristian |
| | Mikudag | 19:00-21:00 | Støkkhøllin | |

## Fimleikurin byrjar mánadagin 8. september!

Rimmar Støkkdagur leygardagin 6. sept. kl. 13-16 í ítróttarhøllini í Runavík. Les meira á www.stokk.net

Kostnaðurin fyri alt fimleikaárið er:

| | |
|---|---|
| Foreldur og børn | 500 kr. |
| Gentur og dreingir 4 - 6 ár | 500 kr. |
| Gentur og dreingir 1. - 7. fl. | 500 kr. |
| Gentur og dreingir 8. - 10. fl. | 600 kr. |
| Vaksin | 700 kr. |
| Kappingarlið | 800 kr. |
| Eykalið | 200 kr. |

- Kostnaðurin fyri alt fimleikaárið skal gjaldast við tilmeldingina leygardagin!
- Til ber at gjalda kontant ella at flyta peningin á kontu 103.336.5 í Norðoya Sparikassa.
- Viðmerk navnið á fimleikaranum og hvat lið fimleikarin teknar seg til. Kvittanin skal takast við leygardagin.

**Tilmelding verður 6. september 2008 kl. 16 til 18 á deildini hjá Norðoya Sparikassa í Saltangará**

www.stokk.net

LØGTINGIÐ

# Farloyvisstarv sum tingskrivari/skrivstovufólk í Løgtinginum

Eitt farloyvisstarv sum tingskrivari/skrivstovufólk í Løgtinginum er leyst at søkja til setan frá umleið november/desember og eitt ár fram. Av tí at talan er um barnsburðarfarloyvi í sambandi við ættleiðing, er ikki gjørligt neyvt at siga, nær farloyvið byrjar, umframt at tað kann vera ein fyrimunur, at tann, sum settur verður, kann starvast eitt styttri tíðarskeið saman við starvsfólkinum, sum fer í farloyvi.

**Uppgávurnar eru í høvuðsheitum hesar:**
At røkja starvið sum triði tingskrivari, annað vanligt skrivstovuarbeiði og ávísar serligar uppgávur.

Tingskrivarastarvið verður dagliga røkt av trimum tingskrivarum við einum fjórða tingskrivara sum avloysara. Høvuðsábyrgdin av tingskrivarauppgávunum er býtt millum 1. og 2. tingskrivara, men við tíðini og neyðugu royndunum skal høvuðsábyrgdin fyri ávísum uppgávum eisini leggjast á triðja tingskrivaran.

Tingskrivarastarvið fevnir í høvuðsheitum um at manna skrivarapallin í tingsalinum og diskin í komuhøllini, at skriva gerðabók og skrá fyri tingfundir og annars at tryggja, at allar telduskipanir í tinginum virka sum tær skulu, og at neyðugu skrásetingarnar verða gjørdar.

Av vanligum skrivstovuuppgávum skal tann, sum settur verður, hava ábyrgdina av telefon¬avgreiðslu, móttøku, posti, nevndarinnkallingum og nevndarskjølum, ferðum, umframt annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Harumframt skal viðkomandi virka sum avloysari í sambandi við ávísar uppgávur. Neyðugt er tó, at allar skrivstovuuppgávur so vítt gjørligt kunnu røkjast av øllum, tá ið á stendur. Eisini kunnu broytingar í starvinum koma fyri.

Av serligum uppgávum hava vitjanir í tinginum stóran týdning. Hendan uppgávan verður eisini røkt av øðrum starvsfólki. Uppgávan fevnir um at taka ímóti fólki, ið biðja um at sleppa at síggja og fáa frágreiðing um tingið og tingarbeiðið.

**Løgtingið:**
Upplýsing um Løgtingið og løgtingsarbeiðið er at finna á heimasíðu okkara www.logting.fo.

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving ella samsvarandi útbúgving ella royndir á økinum. Ein treyt fyri at verða settur er, at viðkomandi er kønur í føroyskum, hevur royndir at arbeiða við teldu og hevur áhuga í politiskum arbeiði. Umsøkjarar, sum hava kunnleika til onnur mál, serliga enskt, hava fyrimun. Tað er eisini av týdningi, at tann, sum settur verður, hevur lætt við at samskifta og er opin, m.a. í sambandi við uppgávuna at taka sær av vitjanum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálráðið og Starvsmannafelagið.

Tað er ein treyt, at tann, ið settur verður, kann átaka sær at arbeiða út á kvøldið, tá tingfundir eru, og tá tað annars er neyðugt.

**Umsókn:**
Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu vera Løgtinginum, Tinghúsvegur 1-3, Boks 208, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. september 2008, kl. 16.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kristinu Samuelsen, starvsfólkaleiðara, á tel. 36 39 13 ella kristinas@logting.fo, ella til Súsonnu Danielsen, stjóra, á tel. 363905 ella susannad@logting.fo.